LM-022/2025

FYLGISKJAL 6

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra:	Landsfelag Pensjónista <lp@eldri.fo>
Sendt:	4. september 2025 12:06
Til:	Almanna- og mentamálaráðið
Cc:	Beate Samuelsen
Emne:	Landsfelag pensjónista - Hoyringgsvar til uppskot til løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
Vedhæftede filer:	Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um almannapensjónir sept. 2025.docx

Til AMMR
Hjálagt hoyringssvar frá Landsfelag Pensjónista til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Vinarliga

Gunnleyg Durhuus
Skrivari

Landsfelag Pensjónista
Løkjatún 1, 160 Argir
Tlf. 219394
www.eldri.fo

LM-022/2025

Landsfelag Pensjónista

Argir 04.09 2025

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Verður sent við telduposti til t-post: ammr@ammr.fo

HOYRINGSSVAR
til
Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

(Ásetan av pensjón eftir forvunnari inntøku undanfarnar mánaðir, innvinnan av pensjónsrættinum o.a.).
Mál nr. 23/11839

Landsfelag Pensjónista hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Viðv. eftirrokning av pensjón
Tað er skilagott, at eftirrokning av pensjónini fer fram leypandi, har ætlanin við uppskotinum var at gera tað meira einfalt.

Endamálið við broytingini var upprunaliga, at KT-skipanin hjá Almannaverkinum skuldi tillagast soleiðis, at pensjónistar skuldu sleppa undan eftirrokning í sambandi við broyttum fyritreytum í inntøkugrundarlagnum.

Pensjónin rindast afturút

Á síðu 17 pkt. 1.4 stendur "Ein avleiðing av hesum er, at pensjónin fer frá at vera goldin frammanundan til at verða goldin afturúr". Í uppskotinum er henda avleiðing bert galdandi fyri tey, ið gerast pensjónistar frá 2026 og í báðum førum verður pensjónin skerd við einum mánað í sambandi við deyða.

Tað, sum Landsfelag Pensjónista metir er átaluvert, er, at tað verður sníkt inn í lógaruppskotið, at pensjónin skal rindast afturút ístaðin fyri forút, sum í dag. Tvs. at hvør pensjónistur missir eitt mánaðarútgjald. Somuleiðis missir pensjónisturin við deyða eitt mánaðarútgjald, har eftirsitandi hava útreiðslur við jarðarferð o.a.

Við hesi tillaging í uppskotinum verður pensjónstíðarskeiðið stytt við einum mánaði. Verður sparingin, sum í viðmerkingunum leysliga er mett til 3,5 til 4 mió. kr. árliga, brúkt til annað enn tað, sum viðkemur pensjónistum, t.d til ein eldrakekk, er talan um enn einaferð

at brúka skerjingar í fólkapensjónini til onnur endamál, hóast fleiri pensjónistar eru millum teirra, sum eru ringast stillað í okkara samfelag.

Mótrokning í arbeiðsinntøku

Tann sparingin, ið her verður gjørd, kundi verið fingið inn við avtøku av mótrokning av arbeiðsinntøku hjá pensjónisti í pensjónini, t.d. eins og gjørt er í Danmark, tí so slapst eisini undan nakrari eftirrokning av hesum ávum. Hetta vildi eisini havt aðrar positivar fíggarligar avleiðingar við sær, bæði fyri einstaklingar og samfelagið. Landsfelagið hevur fleiri ferðir gjørt vart við hetta.

Niðurstøða

Vit vilja staðiliga mæla til, at broytingin í lógaruppskotinum verður avmarkað til tað upprunaliga endamálið, og at ætlanin við skerjing av pensjónsútgjaldinum verður tikin úr uppskotinum.

Vinaliga

Beate L. Samuelsen, forkvinna